# Reglugerð fyri veitan av stuðli frá Tvøroyrar kommunu

Henda reglugerð hevur heimild í kommunufulltrúini og er galdandi fyri allar borgarar og felagsskapir, sum ynskja at søkja um fíggjarligan stuðul frá Tvøroyrar kommunu.

## Kapittul 1

## Endamál

**§ 1.** Endamálið er at stuðla verkætlanum, tiltøkum og átøkum hjá borgarum ella felagsskapum, ið hava sítt virksemi í kommununi, og sum ríka og menna mentanar-, sosiala- og umhvørvisøki fyrst og fremst í Tvøroyrar kommunu.

**§ 2.** Stuðulin verður veittur samsvarandi játtan á fíggjarætlanini hjá kommununi av hesum kontum:

- 410 Seturskúlaferðir 8. flokkur
- 522 Stuðul til mentan
- 524 Stuðul til ítrótt

## Kapittul 2

## Verkætlanir, tiltøk og átøk, sum kunnu søkja um stuðul

**§ 3.** Stuðul kann verða latin til verkætlanir, tiltøk og átøk innan hesi endamál:

*Stk. 1.* Listarligt og mentanarligt virksemi sum til dømis framsýningar, framførslur, konsertir, bóka- og fløguútgávu.

*Stk. 2.* Fyriskipan av ráðstevnum og verkstovum v.m. um mentan og list.

*Stk. 3.* Frítíðarvirksemi sum til dømis ítrótt, skótar og líknandi virksemi.

*Stk. 4.* Áhugafelagsskapir, sum reka samfelagsgagnligt virksemi í høvuðsheitum á sjálvbodnum grundarlagið.

*Stk. 5.* Skúlanæmingar, sum búgva í Tvøroyrar kommunu, og sum fara námsferð uttanlanda.

*Stk. 6.* Stuðulin til seturskúlaferðir, nevndur undir § 2, er fastur árligur stuðul til 8. flokk í Tvøroyrar skúla.

## Kapittul 3

## Umsókn og treytir

**§ 4.** Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar so hvørt tær koma inn á fundum í mentanarnevndini hjá Tvøroyrar býráð, sum vanliga hevur fund 1. ferð um mánaðin.

*Stk. 1.* Umsóknir um stuðul skulu sendast inn í góðari tíð og vera Tvøroyrar kommunu í hendi í seinasta lagi 6 vikur áðrenn verkætlanin/tiltakið/átakið verður hildið.

*Stk. 2.* Stuðul verður ikki latin til verkætlanir, sum eru lidnar, ella tiltøk og átøk, sum hava verið.

*Stk. 3.* Í umsóknini um stuðul skal tað upplýsast um hesi viðurskifti:

- Navn á umsøkjara.
- Dagfesting á umsóknina.
- Kontakt- ábyrgdarpersónur í mun til umsóknina.
- Bústaður hjá umsøkjara og kontakt-ábyrgdarpersóni.
- Teldupost-bústaður hjá umsøkjara og kontakt- ábyrgdapersóni.
- Peningastovnur og konto at flyta stuðulin inn á.
- Ein nágreinilig kunning um innihaldið í verkætlanini/tiltakinum/átakinum og eisini eitt fíggjarligt yvirlit, sum greinar kostnaðin.
- Nær verkætlanin/tiltakið/átakið verður.
- Hvar verkætlanin/tiltakið/átakið verður.
- Um søkt verður um stuðul aðrastaðni frá.

*Stk. 4.* Kommunan kann biðja umsøkjara, sum fær stuðul, um at lata Tvøroyrar kommunu frágreiðing við roknskapi, tá verkætlanin/tiltakið/átakið er liðugt. Hetta verður gjørt saman við fráboðan um játtaðan stuðul.

*Stk. 5.* Álagt verður umsøkjarum, sum fáa stuðul, at tey á uppsløgum, í skráum og aðrastaðni, har tað ber til, at Tvøroyrar kommuna hevur veitt verkætlanini/tiltakinum/átakinum stuðul.

## Kapittul 4

## Viðgerð og avgerð um stuðul

**§ 5.** Trivnaðardeildin hjá Tvøroyrar kommunu tekur ímóti umsóknunum og fyrireikar tær til viðgerð í mentanarnevndini hjá Tvøroyrar býráð.

*Stk. 1.* Mentanarnevndin kann biðja um, at umsøkjarar koma á fund við nevndina fyri at greiða frá um verkætlanina/tiltakið/átakið.

*Stk. 2.* Tá talan er um eina stuðuls-upphædd, ið er størri enn kr. 30.000,- tá skal stuðulin endaliga góðkennast í fíggjarnevndini.

*Stk. 3.* Miðja verður ímóti, at umsøkjarar fáa svar frá Tvøroyrar kommunu innan 1. viku aftaná at fundur hevur verið í mentanarnevndini.

**Kapittul 5**

**Aðrar treytir**

**§ 6.** Vísandi til § 3, stk. 5 í reglugerðini, er stuðulin til skúlanæmingar í mesta lagi kr. 500,- pr. næming.

*Stk. 1.* Mentanarnevndin kann, um serligar orsøkir tala fyri tí, víkja frá ásetingum í hesi reglugerð.

**Kapittul 6**

**Dagføring og broyting**

**§ 7.** Trivnaðardeildin kann í samráði við mentanarnevndina dagføra og broyta hesa reglugerð, men skal í hvørjum einstøku føri kunnað Tvøroyrar býráð hesum viðvíkjandi.

**Kapittul 7**

**Samtykt og góðkend**

**§ 8.** Tvøroyrar býráð hevur á fundi tann 14. juni 2018 samtykt, at góðkenna hesa reglugerð.

**Kapittul 8**

**Gildiskoma**

**§ 9.** Henda reglugerð kemur í gildi tann 1. juli 2018.

Tvøroyri, 14. juni 2018

Kristin Michelsen

Borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen

Kommunustjóri